HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

## Starvsfólk til umhvørvisdeildina

Søkt verður eftir starvsfólki við akademiskari ella umhvørvistekniskari útbúgving til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Starvið umfatar mál innan umhvørvisverndarlógina, serliga umhvørvisgóðkenningar eftir kapitul 5 í lógini.

Hetta merkir, at tú í tí dagliga fert at arbeiða við:

- at meta um umsóknir um loyvir til útleiðingar
- at gera uppskot til umhvørvisgóðkenningar av virkjum
- at hava eftirlit sambært umhvørvisgóðkenningum
- at seta umhvørvisligar treytir til dálkandi virksemi
- at taka støðu í kærumálum
- at fylgja við í altjóða rákinum innan umhvørvisvernd

Starvið er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Tú fært møguleika at menna teg til avbjóðingarnar, bæði innanhýsis og við skeiðum og vitjanum uttanlands. Afturat hesum kemur møguleikin at luttaka í verkætlanum av ymiskum slag innan hetta økið.

Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan náttúruvísund, verkfrøði ella umhvørvistøkni.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvi, CV o.t. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. juli 2000.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Bárð Enni, stjóra, Rók Tummasarson ella Jákup Paula Joensen á umhvørvisdeildini.

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY
Debesartrøð
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. + 298 31 05 08
E-mail: feagency@hfs.fo

## LÆRARAR skúlaárið 2000/2001

Søkt verður eftir lærarum fyri skúlaárið 2000/2001.

2 fulltíðarstørv
1 starv 20 tímar frá 21. august til 19. november

Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4

Umsóknir til størvini skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 24. juni 2000.

**Skúlanevndin í Nes Kommunu**
v/ Elin Ó. á Torkilsheyggi
655 Nes

## Sethús í Lamba til sølu



Húsini, ið eru væl hildin, standa í friðarligum, náttúruvøkrum umhvørvi við góðum útsýni.

Grundøkið, matr. nr. 29ᵉ, er 854 m².
Húsini eru bygd í 1975 og eru 250 m² til víddar.
Kjallarahæddin: Kjallararúm, gongd, stova v/ køki, vaskirúm og fýrrúm.
Miðhæddin: Stova, køkur, wc og gongd.
Loftshæddin: 4 kømur, baðirúm og gongd.
Rúmligur hjallur og garaga við terassu á.
Rundan um húsini er væl røktur urtagarður.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað kunnu síggja húsini eftir nærri avtalu við at venda sær til tlf. 447761 ella 283533, fax 319736.

## Jørð í Hvalvík

Um hóskandi boð fæst, selja vit 5 gyllin í Húsadalshaga í Hvalvík.

Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**
Att: Fríða Patursson, adv.

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

## Kunngerð

**Til ánarar av bingjum í Tórshavnar kommunu.**

Bingjur, ið standa á sama stað meira enn 6 mánaðir, koma undir ásetingar í byggisamtyktini.

Tey, sum varða av bingjum, ið standa á privatum ella almennum øki í Tórshavnar kommunu, verða vinarliga biðin um at seta seg í samband við Teknisku deild hjá kommununi á tlf. nr. 315160 beinanveg.

*Tórshavnar kommuna*



## Haldórsvíkar Avhaldsfelag

Haldórsvíkar Avhaldsfelag takkar hjartaliga øllum tykkum, ið stuðlaðu okkum við lutum til eydnuhjólið 2. hvítusunnudag, og tykkum, sum so trúliga møttu í Avhaldshúsinum í vetur. Ein stór tøkk til tykkum, sum hjálptu til. Somuleiðis takka vit tykkum mongu, sum komu til eydnuhjólið.

*Við fráhaldskvøðu*

**Nevndin**




## Limir og viðskiftafólk

Maskinmeistarafelagið hevur nú fingið heimasíðu á adressuni www.mf.fo

Á síðuni eru upplýsingar um felagið og tess virksemi.

Allir teir sáttmálar, ið felagið hevur við reiðarafeløg, arbeiðsgevarafeløg og almennar arbeiðsgevarar finnast á síðuni.

Høvi er eisini hjá arbeiðsgevarum at søkja eftir maskinmeistarum og hjá maskinmeistarum at søkja eftir størvum á síðuni.

**Maskinmeistarafelagið**

**Bahá'í samfelagið í Tórshavn**

**Miðstøðin í Gundadali**

Opið hvørt fríggjakvøld.
Samkoma kl. 20

»Sannur missur er honum fyri, ið hevur livað dagar sínar í fullkomnari fákunnu um tað, ið veruliga var hann…«
Bahá'i skriftir
www.bci.org/bahai.fo

*Allar støddir*
- **Rundsagabløð**
- **Diamantskivur**
- **Skeriskivur**

*Vit hvessa eisini*



**Tórshavnar Maskinhandil**
v/Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn • Tel. 313442

**www.sosialurin.fo**



# HANDILS LÆRLINGUR til Griffilin

**Til handil okkara, ið selur alla skrivstovuútgerð og ymiskt annað, verður søkt eftir røskum, fyrikomandi lærlingi, sum dámar at hava nógv at gera...**



**Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so kom inn og tosa við Kára Justinussen.**

griffilin
SMS • TEL 31 08 40

**Summartilbo›**
**-15%**

# Hurrá!

**Eg eri 5 støddir afturfarin**

**Torunn Ude, Noreg**

**Minus 12 cm. um búkin!**
Torunn Ude, sum hevur Bechterews sjúkuna og hevur strí›st vi› ovurvekt og vætufylling í nógv ár, er komin í gó›a venjing. Eftir 10 vi›ger›ir vi› ávikavist ultraljó›i og lymfedrenagju hevur einasta hjáárini› veri›, at hon hevur veri› noydd at skift klæ›ini út. Hetta hugvekjandi úrsliti› kemst av eini n‡ggjari klænkiuppfinning sum sameinir ultraljó› og lymfedrenagju. Magafeitt, appelsinhú› og vætufyllingar slepst av vi› tey stø›ini tú vilt uttan strí› og strev.



**Føroya Natúrmedisinska Klinikk**
Sundsvegur 10 • 100 Tórshavn
Tlf. 320395 má.-frí. kl. 9-11
Gó›kent Gaio©umbo›

# Starv sum góðskuleiðari

Fyri framhaldandi at vera við í menningini av okkara framleiðslu og brynja okkum til stóru avbjóðingarnar, sum eru fyri framman, verður søkt eftir einum góðskuleiðara.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi og áhugavert starv sum góðskuleiðari fyri Havsbrún. Eitt starv við nógvum avbjóðingum í vinnugreinum, sum eru í støðugum vøkstri og broytingum. Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú kemur at taka lut í og leggja tilrættis góðskustýringina og dokumentatiónina av framleiðsluni frá rávørum til lidnar vørur.

**Tað er ein fyritreyt, at tú:**
- Hevur góð samstarvsevni.
- Kanst arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.
- Ert tolin, men samstundis ágrýtin.
- Hevur ein ávísan teldukunnleika, dugir væl at samskifta, bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Útbúgving:**
Vit kundu hugsa okkum, at tú hevur eina holla útbúgving, sum gevur tær kunnleika til framleiðslu, kemi, biologi og mikrobiologi.

**Byrjunartíð**
1. september, men vit kunnu bíða nakað eftir rætta fólkinum.

**Løn:**
Sambært avtalu.

**Eitt sindur um Havsbrún:**
Havsbrún er eitt av størstu virkjunum í Føroyum og hevur 35 ár á baki. Á Havsbrún eru tríggjar deildir: Mjøldeildin framleiðir mjøl og lýsi burturúr fóðurfiski og slógvi. Fóðurdeildin framleiðir fiskafóður. Pelagos heilfrystir pelagiskan fisk. Havsbrún hevur ein umsetning uppá uml. 300 mill. kr, harav helvtin er útflutningur. Umleid 100 ársverk eru á virkinum.

Hevur tú hug, áræði, og sært teg føran fyri at røkja hetta starv, ert tú vælkomin at søkja.
Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu vera Havsbrún í hendi í seinasta lagi 24. juli.

Nærri upplysningar um starvið kunnu fáast við at ringja til Havsbrún, og spyrja eftir Jústines ella Pól.

HAVSBRÚN
pf Havsbrún
Box 81
FO-530 Fuglafjørdur
Tlf.: 44 41 60
Fax 44 44 00
Email:bep@havsbrun.fo

Sosialurin - 311820

## Haldórsvíkar Skúli

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv við Haldórsvíkar Skúla fyri skúlaárið 2000/2001.

Tann, ið kann undirvísa í tilevning, smíð og svimjing við gentum, hevur fyrimun.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. juli.

**Haldarsvíkar Skúlanevnd**
v/ Tórhild Hansen
438 Langasandur

**Søkt verður eftir**

## LÆRARUM til Eiðis skúla skúlaárið 2000/2001

Talan er um tvey fulltíðarstørv og eitt við uml. 10 tímum.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meira kann fáast at vita um størvini við at venda sær til fyrstalæraran á tel. 42 35 79 ella 44 33 31.

Eiðis skúli hevur undirvísing 1.–7. árgangi. Komandi skúlaár verða 9 lærarar og 98 næmingar í Eiðis skúla.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Eiðis skúlanevnd í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. juni 2000.

**Eiðis skúlanevnd**
v/ Dortheu K. Sørensen
470 Eiði

Føroya Keypssamtøka

## Deildarleiðari til FK í Klaksvík

Starvið sum deildarleiðari í keypssamtøkuni í Klaksvík verður hervið lýst leyst at søkja og verður at seta skjótast gjørligt.

Deildarleiðarin hevur, við ábyrgd mótvegis stjórn og fyristøðumanni FK, dagligu leiðsluna av handlinum.

Umsøkjarar skulu hava handilsliga útbúgving og helst royndir innan keypssamtøkuarbeiði.

Løn sambært sáttmála við deildarleiðarar í FK.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til *Finn Nielsen, fyristøðumann, 188 Hoyvík, tlf. 314149.*

Skrivlig umsókn skal stílast til *Føroya keypssamtøku, Stjórnin, boks 349, 188 Hoyvík, mrkt.: Deildarleiðari í Klaksvík,* og vera henni í hendi *í seinasta lagi 1. juli 2000.*

**Føroya Keypssamtøka**

## ENDURLÝSING Miðvágs-Sandavágs skúli

Vegna ov fáar umsóknir verður søkt av nýggjum eftir 3 lærarum fyri skúlaárið 2000/2001.

Tvey størv eru fulla tíð og eitt uml. 23 tímar um vikuna.

Umsøkjarar mugu kunna undirvísa í øllum lærugreinum í 1.–10. flokki.

Størvini eru tíðaravmarkað og verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4

Nærri upplýsingar fáast frá skúlastjóranum tlf. 332820.

Umsóknir til størvini skulu vera skúlanevndini í hendi innan 30. juni og sendast til:

**Miðvágs-Sandavágs skúlanevnd**
v/ Kristionnu L. á Lofti
360 Sandavágur

*Lýsið í* **sosialinum**